





*Frá leikinum "Nordost" um gíslatøkuna á Dubrowka leikhúsinum, sum er at síggja á Tjóðpallinum*

# Menniskjað hinu-megin hatrið

**Ongar hetjur og ongir djevlar, bara menniskju, eru í nýggja leikinum "Nordost" á Tjóðpallinum, har 129 ósek fólk lata lív í gíslatøku, sum byggir á veruleikan**

SJÓNLEIKUR

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Í kvøld hevur tjóðpallurin frumsýning av leikinum Nordost. Leikurin snýr seg um hendingina, tá ið Dubrowka leikhúsið í Moskva varð hersett í 2002 av tjetjenskum uppreistrarfólki.

850 fólk vóru tikin gíslar í hersetingini, sum vardi 57 tímar, áðrenn russiskar serdeildir leiddu gass inn í bygningin. Í minsta lagi 129 av gíslunum doyðu.

### Tríggjar kvinnur, tríggjar lagnur

Leikurin Nordost sigur søguna hjá trimum av teimum kvinnunum, sum kundu havt verið í Dubrowka leikhúsinum ræðutímarnar.

Tsura, tann svarta einkjan úr Tjetjenia, hevur mist alt og øll í ræðuleikunum í Tjetjenia og er til reiðar at sprongja seg í luftina fyri sakina. Men undir harðrendu maskuni, goymir ivin og veikleikin seg.

Lettiski læknin Tamara er einkja eftir russiska hermannin Nikolaj, sum tók lívið av sær aftaná at hava verið í Tjetjenia og barst. Hennara bersøgna lyndi og kaldi effektivitetur kemur henni til góðar, tá ið hon stendur uttanfyri leikhúsið og finnur út av dóttirin er innanfyri.

Bókhaldarin Olga verður saman við manninum og dóttrini tikin gísli í Dubrowka leikhúsinum. Hennara róliga og friðaliga verð syndrast, tá ið tjetjensku uppreistrarfólkini tysja inn í leikhúsið, men í mótganginum kemur hennara rættvísi og dirvið til sjóndar.

Her eru ongar hetjur og ongir djevlar. Leikurin sigur søguna um tær tríggjar kvinnurnar, og hvat ið hevur sett tær í ta støðu, tær eru. Allar tríggjar fangaðar og í dýrastu neyð.

### Menniskja hinumegin

Í viðmerking til leikin vísir Hans Andrias Sølvará, søgufrøðingur á, at yvirorðnað er "Nordost" ikki um hendingina í Moskva, men heldur eitt dømi um søgu, sum skal lýsa yvirgang. Á tann hátt vísir leikurin, hvussu hesar tríggjar kvinnurnar verða brúktar í einum politiskum spæli. Hvørgin av pørtunum hevur áhuga í at loysa trupulleikarnar, men vilja heldur brúka støðuna politiskt, sum bara ger støðuna enn verri. Meðan tær tríggjar í allari neyðini og desperatiónini megna at spegla seg í mótpartinum og síggja menniskjað hinumegin, so spælir valdið sjónleik.

Hóast tað illa ber til at ímynda sær støðuna, kvinnurnar eru fangaðar í, hava tær tríggjar Gunnvá Zachariassen, Súsanna Tórgarð og Birita Mohr ikki havt trupult við at seta seg inn í leikirnar.

Júst tí leikurin vísir, hvussu yvirgangur, hatur og harðskapur rakar heilt vanlig menniskju, hevur tað verið lætt at kenna seg aftur í teimum trimum kvinnunum. Tí sum leikararnir vísa á: Í síðsta enda eru vit menniskju jú rættiliga eins. Og netupp tí er tað eisini viðkomandi at spæla ein slíkan leik her heima, hóast hendingin kann tykjast fremmand og 'langt burturi', sum ein av persónunum í leikinum tekur til.

### FAKTA

Leikarar:

| | |
|---|---|
| Tsura | Gunnvá Zachariassen |
| Tamara | Súsanna Tórgarð |
| Olga | Birita Mohr |
| | |
| Leikstjóri | Ria Tórgarð |

Leikurin Nordost hevur frumsýning í kvøld klokkan 20.00 á Meiarínum í Havn.

# Føroysk list í Forum

**Fimm føroysk listafólk umboða Føroyar á listastevnuni Art Copenhagen í Forum um vikuskifti**

LIST

Dagarnar 19-21. september er Art Gallerie Listagluggin við á eini listastevnuni, Art Copenhagen - nordens kunstmesse 2008 í Keypmannahavn.

### Málaðir til høvið

Talan er um størstu, norðurlendska listastevnuna, ið verður hildin í Forum, á hvørjum ári. Við á messuni verða 78 gallarí úr øllum norðanlondum, og hetta er fyrstu ferð, at Føroyar verða umboðaðar við einum gallarí, ið serstakt vísir fram føroyska list.

Listagluggin fer at vísa fram nýggj verk hjá Edward Fuglø, Zacharias Heinesen, Olivur við Neyst, Torbjørn Olsen, Eyðun av Reyni og Kára Svensson.

Mortan Carlsen, sum rekur Art Gallerie Listagluggin greiðir frá, at málningarnir, sum tey fimm listafólkini fara at vísa fram í Forum, eru heilt nýggir og málaðir til júst hetta høvi

Í samband við luttøkuna er gjørd ein heimasíða, www.listagluggin.com . Í fyrstu atløgu ber til at síggja øll listaverkini, ið verða við á messuni umframt aðrar myndir. Seinni verða eisini listaverk hjá øðrum føroyskum listafólkum at síggja á heimasíðuni.

Víst verður eisini til heimasíðuna hjá Art Copenhagen, www.artcopenhagen.dk

**-ave-**



*Edward Fuglø, Boatsman, red, 2008*



*Torbjørn Olsen, Modellin í atelierinum, 2008*